# Tanntrygd

Hetta er eitt upplýsingarskjal um okkara bólkatrygging, Tanntrygd, sum fyritøkur og fakfeløg kunnu tekna sínum starvsfólkum og fakfelagslimum. Hetta skjalið er bert kunnandi og ikki ein fullfíggjað frágreiðing.

Tryggingartreytirnar eru at finna á **www.trygd.fo**. Avtalugrundarlagið er tryggingarskjalið og galdandi tryggingartreytir.

## Hvat er Tanntrygd?

Við Tanntrygd fær tryggjaði endurgoldið upp til 80% av útreiðslunum til ávísar tannlæknaviðgerðir. Tryggingin kann eisini teknast hjúnafelagum, sambúgvum og børnum millum 18 og 24 ár hjá tryggjaða.

### Hvat dekkar tryggingin?

- ✓ Fyllingar, í mesta lagi tríggjar árliga
- ✓ Røntgen
- ✓ Doyving
- ✓ Rótviðgerðir, í mesta lagi tvær viðgerðir árliga
- ✓ Tannhaldsbruni (Parodontose), í mesta lagi kr. 2.000 árliga
- ✓ Protetik (krúnur/brúgvalið/implantat), 80% av kostnaðinum (aftan á ískoytið frá Heilsutrygd), tó í mesta lagi kr. 15.000 árliga.
- ✓ Tanntøkur og skurðviðgerðir
- ✓ Bítiskinnara, í mesta lagi ein hvørt 5. ár

Endurgjaldið fyri allar tannviðgerðirnar, ið eru dekkaðar, verður gjørt upp sambært tilhoyrandi veitingarlista, ið er at finna sum fylgiskjal til tryggingartreytirnar. Endurgjaldsupphæddirnar í veitingarlistanum svara til áleið 80% av kostnaðinum hjá tryggjaða aftan á veitingina frá Heilsutrygd. Samlaða árliga endurgjaldið kann ongantíð verða hægri enn kr. 30.000 fyri hvønn tryggjaðan.

### Hvat dekkar tryggingin ikki?

- ✗ Kanning
- ✗ Tannreinsan
- ✗ Fríðkandi viðgerðir
- ✗ Hækkan av bitinum
- ✗ Ovurviðgerð
- ✗ Tenn, ið mangladu, tá tryggingin varð teknað
- ✗ Krúnuviðgerð av kliniskt sunnum tonnum
- ✗ Fylgiskaðar av prýðislutum og líknandi
- ✗ Ábyrgdararbeiði og feilviðgerð

### Avmarkingar

- ! Trygd dekkar ikki viðgerðir, ið longu vórðu byrjaðar, ætlaðar ella tilráddar, áðrenn tryggingin varð teknað.
- ! Trygd dekkar ikki tannviðgerð, um tryggjaði hevur skatt tenninar við vilja, hevur verið grovt óskettin, hevur verið ávirkað/ur av rúsevni ella hevur verið í bardaga.
- ! Trygd veitir endurgjald fyri tannviðgerð í mun til tær árligu avmarkingarnar og tær upphæddir, sum eru tilskilaðar á veitingarlistanum í treytunum fyri Tanntrygd.

## Hvar tekur tryggingin við?

✓ Tað er ein treyt, at viðgerðin verður gjørd av løggildum tannlækna ella í ávísum førum tannrøktara í Føroyum ella Danmark.

## Hvørjar skyldur hevur tryggingartakarin?

- Tryggingartakarin hevur skyldu til altíð at tryggja sær, at Trygd hevur dagført yvirlit yvir tey starvsfólk/fakfelagslimir, ið skulu verða fevnd av tryggingini.
- Tryggingartakarin skal lesa tryggingarskjalið fyri at tryggja sær, at tryggingarskjalið er sum avtalað.

## Nær og hvussu verður tryggingin goldin?

Tað er tryggingartakarin, ið skal gjalda fyri tryggingina hjá ávikavist starvsfólkum og fakfelagslimum. Tryggjaði rindar sjálv/ur fyri tryggingina hjá møguligum hjúnafelaga, sambúgva og børnum millum 18 og 24 ár.

## Tryggingartíðarskeið?

Tryggingin tekur við tann dagin, ið stendur í tryggingarskjalinum.

Tryggingin er galdandi í eitt ár og verður endurnýggjað leypandi eitt ár í senn sambært høvuðsforfallinum, um ikki tryggingin verður uppsøgd áðrenn endurnýggjan.

Tryggingin fer úr gildi av sær sjálvum við næsta høvuðsforfall um:

✗ Tryggjaði fer úr starvi/fakfelagnum, ið stendur sum tryggingartakari. Tryggingin hjá møguligum hjúnafelaga, sambúgva og børnum fer eisini úr gildi samstundis

✗ Tryggjaði og møguligur hjúnafelagi ella sambúgvi verða sundurlisin ella skild og flyta hvør til sítt,

✗ Tryggjaði er fylt/ur 70 ár,

✗ Børn, sum eru partur av tryggingini, eru fylt 25 ár.

## Hvussu verður avtalan uppsøgd?

Tryggingin kann sigast upp við eini freist á 30 dagar til eitt høvuðsforfall.